DAGSINS MEINING

Tað góða samfelagið

Javnaðarflokkurin hevur sum tann fyrsti flokkurin meldað út við valskránni til løgtingsvalið tann 20. januar 2004. Tað, sum eyðkennir valskránna hjá Javnaðarflokkinum, er, at hon í fyrsta lagi snýr seg um mál og spurningar, sum er viðkomandi hjá tí einstaka føroyginum. Í øðrum lagi er henda valskrá sera ítøkilig.

Tað er uppá tíðina, at spurningar og mál, sum upptaka vanlig fólk aftur koma á dagsskránna. Í góð fimm ár hevur politiska dagskráin verið dominerað av fullveldismálinum eina. Hetta mál hevur verið fört fram á ein hátt, soleiðis at tað hevur blokerað fyri týðandi avgerðum eins og hetta mál hevur skapað split og spjaðing í tjóðini. Nú er tíð uppá at vaska talvuna og at byrja av nýggjum við aftur at seta vælferðina á breddan.

Valskrá Javnaðarflokksins er júst ein slík nýggj byrjan. Um fólk skal liva og trívast her í Føroyum, má politikkur aftur fara at snúgva seg um tey viðurskifti, sum tryggja okkum eitt gott samfelag. Um búskapur og vinnulív skulu kunna blóma má politiska skipanin skapa tryggar og mennandi karmar. Stórir partar av vinnuni hava livað í óvissu um framtíðarkarmarnar. Óneyðug óvissa hevur valdað um framtíðina hjá teimum stóru almennu fyritøkunum, sum eru berandi í vinnulívinum. Her má annað lag koma á og má ein greiður og miðvísur vinnu- og figgjarpolitikkur koma í staðin fyri tað politiska atgerðarloysi og ta líkasælu, ið nú í fleiri ár hava valdað á økinum.

Í hesum høpi er boð Javnaðarflokksins sera áhugavert, har sagt verður, at ein strategi verður løgd, sum skal fevna um menning av nýggjum vinnum og nýggjum marknaðum og sum heild um eina reð av stimbrandi tiltøkum eisini fyri hóttar vinnur av samfelagsligum týdningi uttan tó at fevna um rakstrarstudning til vinnuna. Viðari verður sagt, at føroyski búskapurin skal hava fleiri bein at standa á og at karmarnir skulu gerast støðugir. Eisini eru boð uppá ein meira ítøkiligan og framefitrrættaðan fiskivinnupolitikk. Hetta er júst tað, sum vinnulívinum tørvar.

Tað er áhugavert, at Javnaðarflokkurin umframt ein sera framskygdan og ítøkiligan vinnupolitikk hevur raðfest ávís øki, sum eru vanligum fólki sera viðkomandi. Talan er um familjupolitikk, heilsupolitikk, barna- og ungdómspolitikk, almannapolitikk og útbúgving og gransking. Í heilsuverkinum og á almannaøkinum valdar óvissa og trot er á heilt grundleggjandi tænastum. Boð Javnaðarfloksins eru, at biðilistarnir skulu burtur, at matvøruprísirnir skulu lækkast, at bøtast skal um fólkaheilsuna og pensiónsmálið skal avgreiðast við einari trýstreingjaðari loysn, sum fevnir um fólkapensión, samhaldsfasta og einstaklingin sjálvan. Útspælið hjá Javnaðarflokkinum er áhugavert og sera viðkomandi. Við hesum útspæli er gerandisdagurin hjá øllum føroyingum aftur komin á politisku dagsskránna - tey politisku øki, sum ávirka lívið hjá tí einstaka menniskjanum eru raðfest høgt. Vit hava hægsta skattatrýst í Norðurlondum og Europa sum heild og gerandisdagurin er alt annað enn lættur. Tað er tí í tøkum tíma, at hesi øki verða politiskt raðfest og at fokus aftur politiskt verður sett á vælferðina hjá Føroyinginum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Longu Hall á Løgtingsfíggjarlógini aftur?

Birgir Mohr, Sandi

Hóast tey sjey feitu árini beint nú hava verið!

Lækkandi konjunkturir fyri framman!

Ein av orsøkunum – ella høvuðsorsøkin til samgonguslitið er, at teir báðir stóru – Tjóðveldisfloklkur og Fólkaflokkur eru greiðir yvir, at longu nú er hall aftur á løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 – og at trupult verður at fáa 2004-løgtingsfíggjarlógina at hanga saman, tí er avmynstrað.

Hettar er samstundis ein staðfesting av, at politikkurin frá 1998 er sligin feil á fleiri økjum. Tvær høvuðsorsøkir eru til hallið. Onnur er tann, at samgongan í hástórheit minkaði danska blokkin árliga við kr. 367 milliónum, hin orsøkin er, at miðfyrisitingin er vaksin fyrilitaleyst hesu 6 árini og útreiðslurnar hareftir.

Tað, at inntøkur Føroya fólks lækka nakað við hvørt, tað eru vit von við, og tað áttu løgtingið og landsstýrið at vitað. Vit liva í einum fiskivinnusamfelag, har landsbúskapurin gongur í bylgjum. Tað vita flestu húsarhald í Føroyum. Slíkt gevur svingandi inntøkur. Vita landsins kosnu ikki tað og duga at stýra hareftir, ja so gongur galið og tað er tað, sum hent er – tey dugdu nú at síggja trupulleikarnar nærkast og rýmdu í land av skútuni. Tó var tað kanska tað frægasta, gerast kundi, tó tað ikki vísir ábyrgd.

Men hesum skilinum varð ávarað ímóti øll árini síðan 1998, men tey so sera klóka fullveldisfólkini vildu ikki lurta – fullveldið fram um alt, tí er við at ganga galið nú her hjá okkum – endarnir røkka ikki gaman.

At siga nei til inntøkur, samstundis sum vit hava kempuíløgur fyri framman, sum eru neyðugar fyri okkara framtíð, tað er ikki skilagóður politikkur. Andstøðan á løgtingi hevur ávarað móti hesum øll árini.

Ein nýggj samgonga má tíverri liva við hesum ógvusliga niðurskurðinum, men útreiðslurnar kann hon vónandi gera eitt sindur við sum fráliður. Okkum tørvar eina nýggja samgongu, ein nýggjan politikk.

Tað vil javnaðarflokkurin.

Varðveita frádráttin til sjómenn!

Vinjard Johansen
Valevnið Miðflokksins Eysturoy

Stórsta vinnan hjá okkum eigur verða stuðla fult út. Skal tann meinigi borgarin og skulu privatar fyritøkur klara seg í framtíðini, eiga vit at halda fæst við høvðusvinnuna sum hevur stórran týdning fyri land okkara.

Fyri at borgara skula trívast sum sjómenn, eiga vit ikki at tosað um at skerja ella taka burtur tann skattafrádrátt teir fáa ídag, heldur skula vit halda fram við hesum, og virða okkara sjómenn fyri tað teir eru fyri land okkara.

Vit áttu at sæð hetta sum ein góðan stuðul fyri landið, og heldur roynt at hildi fæst við manningina á skipunum, og fingi áhugan upp hjá ungum røskum monnum fyri sjólívinum.

Landi hevur brúk fyri hesari vinnu, og sjálvandi skal tað hava sín fyrimun, fyri tann sum váðar lív sítt á havinum og er burtur frá familju stóran part av árinum.

Inn í 2004 við nýggjum andliti

John Johannessen,
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi

Góði lesari. Fyri nøkrum døgum síðani tók eg eina stóra avgerð. Kanska ta størstu, eg higartil havi tikið í lívinum. Eftir gjølla umhugsan gjørdi eg av at leggja journalistiska kallið frá mær og játtaði at stilla upp til løgtingsvalið fyri Javnaðarflokkin.

Drúgvu royndirnar, sum kritiski fjølmiðlamaðurin í fólksins tænastu, hava sannført meg um, at brúk er fyri nýggjum andlitum í føroyskum politikki. Nýggjum fólkum, sum standa fyri opinleika. Sum vilja brúka orku uppá at føra veruligan politikk og finna breiðar semjur um politisku álvarsmálini, ið skulu til, fyri at fáa gerandisdagin hjá okkum øllum at hanga saman. At brúka orkuna upp á persónligt stríð og herróp uttan bakland. Tað byggir ikki land.

Tí bjóði eg meg fram til eina nýggja uppgávu. Eg bjóði meg fram sum fólksins tænara á Føroya Løgtingi. Eg bjóði meg fram at fáa álvara og opinleika í føroyskan politikk. At vera við til at skapa tað góða samfelagið. Eitt samfelag, vit kunnu kalla Føroyar fyri øll. Eg bjóði meg fram at finna breiðu semjuna, sum kann skapa eitt sjálvbjargið land, har tað er liviligt hjá øllum samfelagsstættum.

Mín áheitan á teg, er at stuðla mær at røkka málinum. Lat okkum saman fara inn í nýggja árið við einari nýggjari dagsskrá.

Við bestu ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár og við vón um tína atkvøðu tann 20. januar.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Vit eru føroyingar serstøk tjóð - ella hvat??

Jóanis Nielsen
Valevni fyri Fólkaflokkin í Vágum

Alt meira talar fyri, at vit føroyingar skulu hava okkara lóggávu á øllum økjum. Vit upplívdu nú um dagarnar, at friðaligir føroyskir vælgerðarfelagsskapir fingu stemplið yvirgangsfólk sett á seg av limum í danska fólkatinginum, ja, enntá av monnum av muslimskum uppruna, í hvørs londum har menniskju, ið loyva sær at hava aðra meining enn átrúnaðarliga leiðslan, dagliga verða steinað, hongd, hálshøgd og skotin til deyða. Her fingu vit bara lógina í øvugtari útgávu, at forfylgja vælgerðarfelagsskapir við at koyra teir í bólk við brotsmonnum. Víttgangandi muslimar hava ikki fyrilit við nøkrum, heldur ikki STfólki ella hjálparfólkum hjá Reyða Krossi.

Pro vita merkir, at vera Fyri Lívi

Pro Vita, sum merkir, at vera Fyri Lívi, altso sum er ímóti at sláa menniskju íhel, verður samanborðin við eitt nú sjálvmorðsbumbufólk. Um vítgangandi bólkar í USA, sambært fjølmiðlunum, fara so langt, at teir gera seg inn á læknar og onnur, sum fremja fosturtøku, so er neyvan nakar limur í Føroya Pro Vita, sum tekur undir við teimum, ella hevur nakað samstarv við slíkar - tað forbjóðar seg sjálvt - tí so ganga teir móti sínum egna motto: Fyri Lívi. Hesir amerikonsku bólkar liggja sostatt líka langt frá Føroya Pro Vita, sum viðhaldsfólkið hjá donskum fólkatingslimum liggja, sum í grundini eru ímóti at verja lívið hjá hinum mest hjálparleysa skapninginum.

Tú mást ikki sláa íhel!

Sum vanligur kristin føroyingur, hevur tað verið hildið í hevd, at halda fimta boð: Tú mást ikki sláa íhel! Tað er eitt kærleiksboð, sum er galdandi øll menniskju, frá størsta brotsmanni til lítla barnið í móðurlívi. Vit hava fingið tað inn við móðurmjólkini, ikki at skaða okkara næsta á nakran hátt. Í Føroyum eru. Slíkar ríkar siðir, mugu danir ikki banna føroyingum at halda.

Danir skulu halda fingrarnar langt burtur frá okkara lógum og siðum.

Tað má og skal vera eitt krav frá okkum, at danir skulu halda fingrarnar langt burtur frá okkara lógum og siðum. Teir hava nóg mikið at rudda upp í egnum landi. Í Danmark verða árliga umleið 20.000 børn tikin í móðurlívi. Nú er undirskot í yngra ættarliðinum, tey gomlu hava ongan at ansa sær, tí hitt yngra ættarliðið slapp ikki at verða føtt. Tað sigur seg eisini sjálvt, at tá ið 20.000 menniskju av yngra ættarliðinum árliga resta í, so verður gongdin skeiv. Ikki er neyðugt at hava meistarar í støddfrøði at finna fram til tað. Hvørt smábarn kann seta tey tølini upp á ein pappírlepa, telja tey saman og trekkja frá, so einfalt er tað. Og hvør røktingarmaður finnur útav hesum tá ið hann skipar hagan.

Vit vilja halda fast við tey kristnu lívsvirðini

Vit eru føroyingar serstøk tjóð. Skal hetta bara vera sangur á munninum? Ella vilja vit halda fast við okkara siðir og okkara mentan, við tey kristnu lívsvirðini, og framvegis liva undir tryggum og góðum korum

Hjá teimum fara slík tíðindi inn gjøgnum annað oyra og útaftur gjøgnum hitt.

Heldur ikki krossin, kristindómsins merkið

Fara vit at geva eftir og laga okkara lógir eftir donskum mynstri, ja, so kann næsta kravið nattúrliga verða, at geva fríða pornológ í Føroyum, tí tann lógin er galdandi í Danmark og øðrum ESlondum, har tað eitur, at kvinnan skal hava loyvið at selja sín kropp, tað verið seg til litaðu bløðini, pornorásir ella við skøjulevnaði. Uppaftur næsta kravið vil verða tað, ið varð viðtikið í Fraklandi áðrenn jól, at sýtt verður starvsfólki í handlum at bera hálsketu við krossi í, tí tey mugu ikki á nakran hátt vísa fram tað ið minnir um átrúna, heldur ikki krossin, kristindómsins merkið. Krossurin, sum hevur verið heiðursmerki føroyinga í øldir, Krossin, sum menn skóru inn í vaðbeinið, sum vit høgdu inn í gravsteinin, sum vit hevjaðu á kirkjuspírinum. Skipini og bátarnir vóru signaði við at sigla tríggjar ferðir runt á vánni (tríeindin) tá ið tey vóru sjósett. Børnini hava verið signað frá tí tey lógu í vøgguni.

Vit eru føroyingar serstøk tjóð. Skal hetta bara vera sangur á munninum? Ella vilja vit halda fast við okkara siðir og okkara mentan, við tey kristnu lívsvirðini, og framvegis liva undir tryggum og góðum korum sum eitt heiðurligt fólk, ið kann vera eitt fyridømi fyri onnur fólkaslog?

Við ynski um Harrans signað nýggjár.

Barsilsskipanin betrast

Elin Lindenskov,
valevni Javnaðarfloksins

Javnaðarflokkurin vil varðveita og betra rættin til barnsburðarfarloyvi. Lógin um barsilsfarloyvi, sum vit hava í dag, gevur foreldrunum rætt til hálvt árs farloyvi við løn, síðani hálvt árs farloyvi uttan løn.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at barsilsskipanin við tíðini kann veita lon allar 12 mánaðirnar. Eisini vilja vit virka fyri, at skipanin gerst smidligari, soleiðis at hon kann tillagast einstøku familjuni. Hetta vilja vit gera við at geva foreldrunum møguleika til sjálv at velja, hvussu tey ynskja at brúka barsilstíðina. T. d. tá ein familja ynskir at brúka nakrar mánaðir heima, síðani arbeiða niðursetta tíð eitt tíðarskeið, ella goyma nakað av tíðini, til familjan seinri hevur tørv á tí.

www.lindenskov.com

Sjálvstýri við ábyrgd

Milson Berg,
valevni hjá sjálvtsýrisflokkinum í Suðuroy

Fiskur er enn høvuðsgrundarlagið undir okkara vælferð. Har fiskurin samlast er lív í. Við hesum í huganum fór eg upp í arbeiði at fyrireika landingarmiðstøð á Tvøroyri. Tungt hevur tað verið, men nú stendur úrslitið uppi og er klárt at byrja arbeiðið fyrst í komandi ári. Eitt úrslit av áhaldni at røkka málinum, sum viðhvørt tóktist at vera nokk so ómøguligt, var eydnað. Og nettupp tað at røkka málinum og ongantíð sleppa ætlanini er tað, eg ætli at taka við í tað politiska arbeiði bæði innan mín flokk og í størri høpi:

Tað skal vera gott at vera bæði ungur og gamal í Føroyum. Frítíðarmøguleikar fyri ung verða raðfest frammalaga, íbúarmynstri verður endurskoðað, tað skal vera møguleiki bæði at seta føtur undir egið borð og búgva bíliga seinni í lívinum tá krefturnar byrja at ganga undan. Eisini skal vera lættari at vera barnafamilja í Føroyum og fólkapensiónin eigur sum skjótast at verða dagført.

Útróðrarflotin er illa fyri. Grundarlagið at investera til nýgerð er burtur. Har skal arbeiðast fram ímóti betri lánimøguleikum, loyvi at flyta avlop frá einum ári til næsta, og minstiforvinningurin skal aftur á sama stoði, sum hann var áðrenn broytingaruppskoti í desembur 1997.

Sjálvstýri við ábyrgd. Tað merkir m.a. at einki skal yvirtakast uttan tað er búskaparliga forsvarligt, og at fólksins vælferð við verandi inntøkumøguleikum ikki verður skerd. Fólkið eigur at verða spurt eftir hvussu langt og hvussu skjótt vit skulu at fara.

Suðringar! Sjálvstýrisflokkurin og valevni tess heita á tykkum um at standa saman um flokkin. Við áhaldni fara ogur at náa tey mál sum eru sett. Nøkur av teimum eru longu nádd og eitt av teimum fara ogur at merkja tá nýggji Smyril væntandi fer í sigling komandi ár.

Umhvørvisábyrgd Natúr- og umhvørvisdygga orkuútbyging

Bergur P. Dam,
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Tað er tíð uppá, at løgtingið átekur sær sjálvsøgdu ábyrgdina av orkupolitikkinum í okkara landi. Tað er skeivt og vandamikið at lata eina monopolfyritøku sum SEV stýra orkupolitikkinum.

Í eina tíð hevur føroyskur orkupolitkkur aftur verið á dagsskrá. Ella kanska heldur tann vantandi orkupolitikkurin. Tí veruleikin er jú, at løgtingið ikki hevur vilja tikið á seg ábyrgdina av at orða, eftir hvørjum treytum orkuútbyggingin í Føroyum skal verða.

Og sum ikki einaferð, er tað SEV, sum er í brennideplinum. Hesin felagsskapur, ið mest er at líkna við ein orkupolitiskan dinosaur.

Við býrokratiskari arrogansu roynir SEV leiðslan at læsa orkuútbyggingarnar í Føroyum á eini natúr- og umhvørvisøyðileggjandi kós. Hvørt lítið fet á annan bógv, krevur ómetaligt stríð við henda felagsskap. Higartil hevur tað bert eydnast í tveimum førum - alduorkuverkið við Søltuvík og tær tríggjar vindmyllurnar við Mýrarnar í Vestmanna - at bróta einoygdu SEV leiðina.

Vanlukkan á Eiði

Mest ræðandi dømi um skilaleysa orkuútbygging hava vit sað í samband við sonevndu Eiðis verkætlanina. Har er stórur partur av natúruni í Eysturoynni skamfílaður í enum milliardaprojekti, sum tó ikki hongur búskaparliga ella orkutøkniliga saman. Og nú ætlar so leiðslan í SEV at fara viðari - at leggja uppaftur fleiri áir turrar - at forða enn størri parti av feska vatninum at renna út í firðirnar.

Her er talan um útbygging, sum kann hava við sær óbótaligan skaða á bæði natúr og umhvørvi. Tí eiga allar hugsandi kanningar, um árin á natúr og umhvørvi, at verða gjørdar, áðrenn farast kann víðari.

Runnu undan ábyrgd

Bæði SEV-leiðslan og landsstýrismaðurin í umhvørvismálum føra fram at ábyrgdarbýtið í slíkum málum er ógreitt. SEV sigur seg ikki hava nakrað ábyrgd av umhvørvinum og boðar frá, at SEV ætlar at gera sum minst av árinskanningum. Og landsstýrismaðurin skjýtir seg undir, at nýtt lógarverk enn ikki er liðugt.

Men tað skerst ikki burtur, at fráfarandi samgonga hevur runnið undan ábyrgdini - eisini á umhvørvisøkinum. Til dømis bað samgongan um, at danskir myndugleikar tóku fyrivarni viðvíkjandi Føroyum, tá Danmark staðfesti Kyoto sáttmálan. Um Føroyar høvdu bundið seg til ymsu altjóða sáttmaálarnar á umhvørvisøkinum, hevði ongin ivi verið um, at ein tílíkar útbyggingar ikki kundu verið framdar, uttan so at djúptøknar árinskanningar fyrst vórðu gjørdar.

Ein landsuppgáva

Ein stór uppgáva hjá komandi løgtingsmanning verður at seta í verk ein veruligan umhvørvispolitikk fyri Føroyar. Ein politikk, har mál verða sett upp um, hvussu vit skulu útbyggja okkara land á einum burðardyggum grundarlagi. Tað merkir, at tað í øllum málum skal gerast upp, hvørjar avleiðingarnar fyri natúr og umhvørvi verða. Og at krøv um fyrilit fyri umhvørvinum verða sett øllum útbyggingum.

Men ikki minst merkir tað, at landið tekur málið í tí álvara, sum krevst og skapar karmar, soleiðis at eisini verður rúm fyri alternativum til traditionellar loysnir.

Til hetta er gjørt, eigur SEV útbyggingin í Eysturoynni at bíða.